


# Grøn plakat til grøna húsið

Flestu heim í Føroyum hava onkra av mongu plakatunum, sum Norðurlandahúsið hevur givið út seinastu 25 árini. Øll stór tiltøk hjá Norðurlandahúsinum hava havt sína listarligu plakat, og hesar plakatir hava borið Norðurlandahúsið út í hvønn krók í landinum.

Føðingardagurin hjá Norðurlandahúsinum er einki undantak í so máta. Hann fær eisini sína egnu plakat. Tað er listamaðurin, Edward Fuglø, sum hevur gjørt 25 ára føðingardagsplakatuna hjá Norðurlandahúsinum. Málningurin er tó ikki upprunaliga gjørdur til føðingardagin.

- Eg havi ikki havt Norðurlandahúsið í huga, tá eg málaði, men eg fegnist sjálvandi um, at Norðurlandahúsið hevur valt at brúka hendan málning til plakat, sigur Edward Fuglø við Sosialin. Grøna plakatin ímyndar ein ryggsekk-ferðandi, sum hyggur niður á lítið føroyskt landsslag.

Norðurlandahúsið hevur havt stóran týdning fyri føroyska myndlist, staðfestir listamaðurin, Edward Fuglø.

- Norðurlandahúsið hevur havt ómetaliga stóran týdning. Serliga fyri støðið í listini og mentanartilboðunum. Eg vil siga tað soleiðis, at eg veit ikki, hvussu skilið hevði verið, um Norðurlandahúsið ikki varð bygt.

Edward Fuglø nevnir sum dømi framsýningina, Natúrligvís, sum framvegis ferðast runt norðanlond.

- Norðurlandahúsið hevur miðlar og kontaktir, sum gera at ein framsýning røkkur longri enn aðrar listaframsýningar. Húsið hevur givið okkum innlit í góða útlendska list, og givið okkum høvi at vísa okkara list aðrastaðni. Hetta hevur verið ómetaliga týdningarmikið, staðfestir Edward Fuglø, sum hevur málað grønu føðingardagsplakatina hjá grønu húsunum.

**DH**

# Grønlendsk list vitjar



Í samband við føðingardagin hjá Norðurlandahúsinum letur ein grønlendsk framsýning upp fríggjadagin. Framsýningin, Quadrofoni, er á veg til Letlands, har hon verður sýnd fram í summar.

Listafólkini handan framsýningina eru fýra grønlendingar úr Quqortoq, sum eru í familju við hvønn annan men úr ymiskum ættarliðum. Ivars Silis, Aka Høegh, Inuk Silis-Høegh og Boletta Silis-Høegh.

Sagt verður um Quadrofoni, at framsýningin úttrykkir bæði ankring og opbrud frá slektuni og hjemstavn í suður Grønlandi. Ummælarar hava sagt, at henda framsýningin er ein av mest heilstoyptu grønlendksu listaframsýningum nakrantíð.

Ferðandi framsýningin hevur ikki allar lutirnir frá upprunað framsýningini, men listaverk eru eisini gjørd serliga til hesa framsýning.

**DH**

# Hátíðarhald við tónleiki

**25 ára føðingardagurin hjá Norðurlandahúsinum verður hildin við stórum hátíðarhaldið fríggjakvøldið 9. Mai.**

NLH 25 ÁR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Almenn móttøka í samband við at Norðurlandahúsið fyllir kvart hundrað verður fríggjadagin klokkan 16. Ein hálvan tíma seinni letur grønlendska framsýningin »Quadrofoni« upp, og klokkan 17.30 verður nýggja Athøll alment tikin í nýtslu. Gestarøðari til hetta tiltakið verður Eyðun Andreasen, professari á Fróðskaparsetri Føroya.

Sjálv føðingardagsveitslan má tó sigast at vera hátíðarhaldið, sum verður klokkan hálvgun átta fríggjakvøldi við tónleiki, dansi, sniðgeving og søguligum afturliti. Tónleikurin er kanska tann føroyska listagrein, sum hevur havt størst gleði av Norðurlandahúsinum, og tað er eisini tónleikur sum fyllir mest í programminum fríggjakvøldið. Tiltakið verður sent beinleiðis í Kringvarpi Føroya.

Millum forvitnisligu innsløgini á hátíðarhaldinum kunnu nevnast nýskrivaða kantatan "Jørð" eftir Róa Patursson og Kára Bæk, sum verður framførd av Aldubáruni og kórinum Tarira, dansur við Kristinu O. Sørensen, tónleikur við Heiðrikki á Heygum, Eivør Pálsdóttir, BUDAM og Hanusi og Aldubáruni.

Føroyskir sniðgevar fara eisini at framsýna nýtt design og hesin parturin av framførsluni er gjørdur í samstarvi við SamVit. Og so verður húsið sjálvt eisini sett í fokus við millum øðrum afturlítandi filmsbrotum. Vertir á hátíðarhaldinum verða Jensina Olsen og Sjúrður Skaale.

# Føroysk framsýning í Finlandi




Í sambandi við at Norðurlandahúsið í Føroyum fyllir 25 ár 8. mai 2008, letur føroyska framsýningin, Dyr, upp á Gallarí Norsu í Helsinki hósdagin. Tað eru tær tríggjar føroysku listakvinnurnar Astrid Andreasen, Guðrið Poulsen og Tita Vinther, sum sýna fram verk síni. Framsýningin í Helsinki er til og við 8. juni 2008.

**DH**